# Javnstøðuætlan 2024-2027

Fróðskaparsetur Føroya

Februar 2024

# Innihaldsyvirlit


1 FORORÐ ........ 1

2 UM LÓGARVERKIÐ ........ 2

3 STØÐUMETING ........ 3

4 MÁL OG RAÐFESTINGAR ........ 9

5 ÁTØK ........ 11

6 TÍÐARÆTLAN ........ 12

7 ÁBYRGDARBÝTI ........ 12

8 FÍGGING ........ 13

9 LÓGARVERK ........ 14

10 ORÐALISTI ........ 17

Góðkend tann 9. februar 2024.

Martin Tvede Zachariasen

rektari

# 1 Fororð

Á Fróðskaparsetrinum virka vit fyri at fremja javnstøðu í verki og vilja hava fjølbroytni á starvs- og lestrarstaðnum. Arbeiðið við at fremja javnari møguleikar millum kynini, inklusjón og fjølbroytni skal vera kjølfest í leiðsluni á øllum stigum á Fróðskaparsetrinum. Endamálið við javnstøðuætlanini er at eggja øllum leiðarum, starvsfólki og lesandi til at fáa javnstøðu framda á Setrinum og at fáa øll at taka hetta javnstøðuarbeiðið til sín sum eina skyldu.

Henda javnstøðuætlanin fevnir í fyrstu syftu einans um javnstøðu millum kynini.

So statt leggur javnstøðuætlanin hjá Fróðskaparsetri Føroya fram høvuðstættir, mál og átøk til frama fyri javnstøðu millum kynini. Eitt endamál við ætlanini er at fáa javna luttøku av kynunum í arbeiðslívinum á Setrinum. Hetta ber við sær átøk til frama fyri javna kynsumboðan, átøk ímóti vansum vegna kyn, javnbjóðis treytir í sambandi við umsóknir og átøk at fremja samljóð millum familju- og arbeiðslív hjá starvsfólkunum á Setrinum. Millum átøkini eru eisini venjingar við tilvitskugerð um kynsspurningar.

Úrslitini frá dátuinnsavnan, málini og átøkini skulu vera liður í áhaldandi arbeiðinum at fremja javnstøðu og margfeldi á Setrinum.

Henda fyrsta javnstøðuætlanin er galdandi fyri tíðarskeiðið 2024-2027. Í seinasta lagi í apríl 2027 verður hon endurskoðað og dagførd eftir nýggjari støðumeting.

Javnstøðuætlanin er tøk hjá øllum starvsfólkinum og almenninginum á føroyskum og enskum á heimasíðu okkara, setur.fo.

# 2 Um lógarverkið

Í Føroyum er lógarverk um javnstøðu og verju av minnilutabólkum, ið hevur til endamáls at beina burtur allan mismun vegna kyn, ættarslag, tjóðaruppruna, húðarlit, aldur, brek, kynslig viðurskifti, tjóðskaparligan ella samfelagsligan uppruna, politiska, átrúnaðarliga ella heimspekiliga sannføring, yrkisfelagsligt ella annað tilknýti ella aðra støðu.

Lógarverkið, ið tekur støði í meginregluni um javnrættindi, fevnir um lógir, rundskriv, leiðbeiningar og annað regluverk, ið er galdandi fyri allar almennar stovnar, harímillum Fróðskaparsetur Føroya. Eisini hevur Fróðskaparsetur Føroya egnar leiðreglur (sí Lógarverk niðanfyri).

# 3 Støðumeting

Til tess at tryggja miðvíst arbeiði og haldgott eftirlit við úrslitum av verksettum átøkum er umráðandi at grunda javnstøðuætlanina á kunnleika og dátur. Talvurnar niðanfyri eru grundarlagið undir okkara støðumeting, sum leiðbeinir okkara javnstøðumál. Innsavnaðu dáturnar eru nýggjastu tøku dáturnar frá 2022 og 2023. Tølini eru rundað at gera tey eyðlisin. Nýggj innanhýsis støðulýsing og almenn frágreiðing verða gjørdar árliga í februarmánaði.

## Kynsbýti

### Deildir




| Deild | Sam. [ársv.] | % ♀ | % ♂ | % ♀ '22 |
|---|---|---|---|---|
| Alt Setrið (181 høvd) | 169 | 59% | 41% | *60%* |
| Setursskrivstovan og Lestrarskrivstovan | 36 | 68% | 32% | *63%* |
| Føroyamálsdeildin | 15 | 56% | 44% | *71%* |
| Námsvísindadeildin | 31 | 69% | 31% | *63%* |
| Náttúruvísindadeildin | 30 | 41% | 59% | *32%* |
| Deildin fyri heilsu- og sjúkrarøktarfrøði | 26 | 89% | 11% | *96%* |
| Søgu- og samfelagsdeildin | 31 | 35% | 65% | *38%* |

Í talvuni og ritmyndini yvir deildir oman fyri sæst, at tað eru 181 starvsfólk á Setrinum við 169 ársverkum. Ein lítil yvirvág av kvinnum er yvirhøvur (59%). Størsta yvirvág er í Deildini fyri heilsu- og sjúkrarøktarfrøði, har 89% av 26 eru kvinnur. Yvirvág av kvinnum er eisini í Setursskrivstovuni og Lestrarskrivstovuni (68%) og í Námsvísindadeildini (69%), meðan yvirvág av monnum er í Søgu- og samfelagsdeildini (65%).

## Leiðsla




| Deildarleiðsla | Leiðarar [tal] | % ♀ | % ♂ | % ♀ '22 |
|---|---|---|---|---|
| Leiðarar á øllum Setrinum | 22 | 45% | 55% | 44% |
| Setursskrivstovan | 5 | 40% | 60% | 40% |
| Føroyamálsdeildin | 3 | 0% | 100% | 0% |
| Námsvísindadeildin | 4 | 75% | 25% | 75% |
| Náttúruvísindadeildin | 3 | 67% | 33% | 67% |
| Deildin fyri heilsu- og sjúkrarøktarfrøði | 3 | 67% | 33% | 67% |
| Søgu- og samfelagsdeildin | 4 | 25% | 75% | 25% |
| Ovast leiðsla | 7 | 29% | 71% | 14% |

Í talvuni og ritmyndini yvir leiðslu fyri oman sæst, at samanlagt 22 leiðarar eru á Setrinum. Yvirhøvur er lítil yvirvág av monnum (55%). Í Føroyamálsdeildini er størsta yvirvág, har 100% av trimum eru menn. Stór yvirvág er eisini í Námsvísindadeildini, har 75% av 4 eru kvinnur. Í ovastu leiðslu eru 71% av 7 leiðarum menn.

## Starvsbólkar




| Starvsbólkur | Sam. [ársv.] | % ♀ | % ♂ | % ♀ '22 |
|---|---|---|---|---|
| Samanlagt | 110 | 54% | 46% | 49% |
| Ph.d.-lesandi og -vísindastarvsfólk | 8 | 50% | 50% | |
| Námslektarar | 53 | 67% | 33% | 75% |
| Adjunktar | 18 | 44% | 56% | 54% |
| Lektarar | 17 | 46% | 54% | 31% |
| Professarar | 9 | 6% | 94% | 6% |
| Dekanar | 5 | 60% | 40% | 20% |

Í talvuni og ritmyndini yvir starvsbólkar fyri oman sæst, at ársverk yvirhøvur eru javnstødd at kalla: kvinnur telja 54%, menn 46% (122 starvsfólk, 110 ársverk). Hjá námslektarum, sum er størsti bólkur, eru 67% av 53 kvinnur. Hetta er lækkað frá 75% kvinnum í 2022. Hjá

professarum, sum er hæsta undirvísarastarv, eru 94% av 9 ársverkum menn. Hetta er sama býti sum í 2022. Hjá dekanum er stór broyting í kynsbýti, frá at 20% av 5 eru kvinnur í 2022, til at 60% av 5 eru kvinnur í 2023.

## Rithøvundar at javnlíkamettum greinum




| **Høvundar** | **Sam. [tal]** | **% ♀** | **% ♂** |
|---|---|---|---|
| Høvundar sam. | | | |
| *2022* | 239 | 33% | 67% |
| *2021* | 196 | 37% | 63% |
| *2020* | 161 | 31% | 69% |
| *2019* | 146 | 34% | 66% |
| Fyrstnevndir h. | | | |
| *2022* | 62 | 42% | 58% |
| *2021* | 44 | 41% | 59% |
| *2020* | 43 | 40% | 60% |
| *2019* | 35 | 46% | 54% |
| Síðstnevndir h. | | | |
| *2022* | 70 | 30% | 70% |
| *2021* | 52 | 35% | 65% |
| *2020* | 42 | 26% | 74% |
| *2019* | 37 | 30% | 70% |

Í talvuni og ritmyndini yvir høvundar at javnlíkamettum greinum fyri oman sæst, at tað yvirhøvur eru 2/3 menn. Hetta verður tó eitt sindur javnari, tá ið tað snýr seg um fyrstnevndar rithøvundar; tá eru 58% menn (2022). Og eitt sindur ójavnari verður, tá ið tað snýr seg um síðstnevndar rithøvundar; tá eru 70% menn (2022). Hetta býti broytist ikki stórliga, sum árini líða.

## Ph.d.-lesandi




| Ár | Deild | Sam. [tal] | % ♀ | % ♂ |
|---|---|---|---|---|
| 2022 | **Sam.** | 21 | 52% | 48% |
| | **Føroyamálsdeildin (FMD)** | 2 | 100% | 0% |
| | **Námsvísindadeildin (NÁD)** | 2 | 100% | 0% |
| | **Náttúruvísindadeildin (NVD)** | 5 | 40% | 60% |
| | **Deildin fyri heilsu- og sjúkrarøktarfrøði (DHS)** | 7 | 43% | 57% |
| | **Søgu- og samfelagsdeildin (SSD)** | 5 | 40% | 60% |

Í talvuni (2022) og ritmyndini (2020-2022) yvir ph.d.-lesandi fyri oman sæst, at savnaða býtið er javnt. Í Deildini fyri heilsu- og sjúkrarøktarfrøði, sum er størsti bólkur, er eisini rættiliga javnt; 57% av 7 ph.d.-lesandi eru menn (2022). Í Føroyamálsdeildini og

Námsvísindadeildini eru fá ph.d.-lesandi, men av hesum eru 100% kvinnur øll árini 2020-2022.

### Starvsfólk

Kynsjavnvágin millum starvsfólkið á Setrinum hevur verið góð tey seinastu mongu árini, tó er kynsbýtið ójavnt býtt millum tær ymsu deildirnar, leiðslurnar og starvsbólkarnar.

### Lesandi

Alsamt fleiri kvinnur eru á hægri lærustovnum, bæði í Føroyum og í londunum kring okkum. Tey seinastu árini hava kvinnur umboðað millum tveir triðingar og tríggjar fjórðingar av teimum lesandi á Setrinum. Tøl verða við í næstu ársfrágreiðing.

# 4 Mál og raðfestingar

Fróðskaparsetur Føroya miðar eftir einum familjuvinaligum umhvørvi bæði í fyrisiting og vísindaliga arbeiðinum, har kynini hava somu møguleikar.

Við javnstøðuætlanini hevur Setrið sett sær hesi mál:

- At fáa betri fatan og tilvitsku millum starvsfólk og lesandi um kyn og kynsmismun og at byrgja fyri ágangandi atburði.
- At fylgja væl við javnstøðuni og framgongdini á øllum økjum, skráseta hetta og áhaldandi mennast í tí.
- At bøta um kynsjavnvágina í ávísum fakbólkum.
- At bøta um kynsjavnvágina á leiðslustigi.
- At tryggja javnbjóðis møguleikar við somu viðferð av kynunum viðvíkjandi arbeiði og yrkisleið.
- At styðja samljóð millum arbeiðs- og familjulív hjá kynunum.
- At fremja tilvit um kynsspurningin í øllum liðum í virki okkara.
- At stremba eftir javnstøðu í faknevndum og øðrum avgerðareindum uttan at máa undan fakligum førleikum.
- At tryggja breiða luttøku frá øllum stovninum í málunum og miðunum í hesi javnstøðuætlan.
- At seta framsøkin avriksmál í tølum og dýpd fyri næstu javnstøðuætlan (2028-2031) viðvíkjandi starvssetanum, framflutningi og at varðveita starvsfólk, og at bjóða lesandi lestur og at varðveita tey.
- At styðja javnbjóðis møguleikar fyri starvssetan og framflutningi.

Raðfestingar fyri 2024 og 2025:

- Setrið skal orða felags meginreglur fyri fjølbroytni, inklusjón og javnrættindum og kunna bæði lesandi og starvsfólk um hesar meginreglur.
- Tað eru nógvar áskoðanir og tulkingar av fjølbroytni, inklusjón og javnrættindum. Tað er umráðandi, at arbeiðið byggir á vísindi, og at vit hava felags fatan av hugtøkunum.
- Í fyrru helvt av 2024 fer javnstøðunevndin at standa fyri einari verkstovu um evnið.

- Setrið fer at arbeiða við meiri gjøgnumskygni í starvssetanum og framflutningi. Serliga virkisgongdir um framflutning skulu lýsast betur.

Aftur at hesum fer javnstøðunevndin at arbeiða við teimum átta viðmælunum, sum *Taskforce for diversitet, inklusion og ligestilling* hevur sent donskum universitetunum:

- *At der tilbydes kurser i inkluderende ledelse til ledelsen på universiteterne.*
- *At universiteterne alle har en overordnet barselspolitik.*
- *At der sker en forventningsafstemning i forbindelse med barsel, f.eks. om tilbagevenden og om den ansattes opgaver i barselsperioden.*
- *At der anvendes transparente kriterier for udvælgelse af forskere som optages på ekspertlister til brug for eksempelvis mediekontakt.*
- *At der anvendes inkluderende sprogbrug*
- *At ledelsen på universiteterne er opmærksom på fordelingen af ikke-forfremmende opgaver blandt de ansatte.*
- *At der skabes et overblik over data vedr. køn og karriereprogression i universitetssektoren.*
- *At man tilstræber at undgå uforholdsmæssigt meget udvalgsarbejde for medarbejdere af minoritetskøn.*

# 5 Átøk

Við støði í støðumetingini, innsavnaðum dátum og galdandi lógarverki um javnstøðu hevur Fróðskaparsetur Føroya staðfest, at átøk til frama fyri javnstøðu eru neyðug á hesum økjum:

- Bygnaðir, ið styðja javnstøðuarbeiðið.
- Tilvitskugerð og førleikamenning.
- Íkast frá áhugapørtum.
- Stovnsmentan og familjupolitikkur.
- Starvssetanir, úrval og framflutningur.
- Leiðsla og avgerðir.
- Fyribyrging av kynsligum ágangi.
- Kynsspurningar í granskingar- og undirvísingartilfari.
- Greiningararbeiði, lutmál, støðulýsingar, eftirlit og eftirmeting.
- Ágóðar til frama fyri javnstøðu.

Til tess at røkka ásettum málum setur Fróðskaparsetur Føroya hesi átøk í verk:

- At almannakunngera javnstøðuætlan Setursins á alnetinum.
- At seta á stovn javnstøðunevnd. Í nevndini verða 1-2 umboð fyri hvørja deild og fyri fyrisitingina og 2 umboð fyri tey lesandi.
- At fremja javnstøðu í starvssetanum og framflutningi.
- At orða starvslýsingar uttan at benda á kyn.
- Framhaldandi at savna tøl inn og hava eftirlit við gongdini og at menna hetta enn meira. HR ger støðulýsing eina ferð um árið í februarmánaði.
    - Greiningar, ið skulu koma afturat:
        - Greina lønarjavnvágina millum kynini á ymsu stigunum.
        - Greina aldursjavnvágina millum kynini á ymsu stigunum.
        - Greina menningina í starvsleiðum við javnstøðu í huga: Hvussu leingi eru kynini á hvørjum stigi, áðrenn tey verða framflutt.
- At bera so í bandi, at í øllum tilmælum um setan skal standa:
    - Hvussu nógv av hvørjum kyni søktu starvið.
    - Hvussu nógv av hvørjum kyni vórðu boðin til samrøðu um starvið.
    - Hvat kyn tann hevur, ið fekk starvið í boði.

- At tryggja at kynini eru umboðað í setanarbólkum innanhýsis og í metingarnevndum uttanhýsis, bæði í sambandi við at seta í starv og at flyta fram vísindastarvsfólk. Søkt skal verða um undantaksloyvi hjá rektaranum, um hetta ikki ber til.
- Javnstøðunevndin skal skipa fyri verkstovu um kyn og tilvitskugerð.
- At bera so í bandi, at javnstøða og javnstøðuátøk verða umrødd til menningarsamrøðuna á leiðslustigi.
- At lata standa í øllum starvslýsingum, bæði uttan- og innanhýsis, at Setrið væntar, at allir leiðarar taka fult undir við javnstøðuætlan tess.
- Hava kynsligt fjølbroytni við í lýsingaátøkum og øðrum samskifti, t.d. faldarum, plakatum, filmsbrotum o.s.fr.

# 6 Tíðarætlan

Hesa javnstøðuætlan samtykti Fróðskaparsetur Føroya hin 09. februar 2024.

Úrslit av átøkum og aðrar broytingar á javnstøðu- og margfeldisøkinum verða eftirmett árliga, t.e. í februarmánaði 2025, 2026 og 2027.

Í seinasta lagi í apríl 2027 verður javnstøðuætlanin eftirmett, endurskoðað og dagførd til eina nýggja ætlan, ið skal galda fyri tíðarskeiðið 2028-2031.

# 7 Ábyrgdarbýti

Ábyrgd av at fremja ætlaðu átøkini: Martin Tvede Zachariasen, rektari.

Ábyrgd av at savna inn hagtøl og annað tilfar, at greina, at hava eftirlit, at leggja úrslit fram fyri javnstøðutoymið á Setrinum og at geva tilfarið út á netið í ársfrágreiðing: Katrin Poulsen, HR-leiðari.

Øll hava felagsábyrgd at fremja hesa ætlan. Setrið skal gera greitt, hvat ið væntað verður, hvør fígging er og hvussu endurskoðað verður.

# 8 Fígging

Fróðskaparsetur Føroya útvegar hóskandi fígging til javnstøðuarbeiðið, soleiðis at henda ætlan verður burðardygg. Eitt nú skulu limirnir í javnstøðunevndini fáa tíð at arbeiða við javnstøðuspurningum. Tey lesandi í javnstøðunevndini fáa fundarpening fyri at taka lut.

Fróðskaparsetrið viðurkennir týdningin av javnstøðu í øllum fíggjarviðurskiftum: hvussu fígging verður býtt millum kynini, og hvussu starvsbyrðin er. Fróðskaparsetrið eigur at hava í huga, at fíggjarligar avgerðir kunnu ávirka kyn ymisliga.

# 9 Lógarverk

Føroyska lógarverkið um javnstøðu og verju móti mismuni fevnir um fylgjandi lógir, leiðbeiningar, rundskriv og regluverk:

1. Løgtingslóg nr. 52 frá 3. mai 1994 um javnstøðu millum kvinnur og menn
    - bannar allan mismun vegna kyn, uttan serlig rættindi hjá øðrum kyninum, ið eru javnstøðu at frama. Lógin ásetur, at kvinnum og monnum skulu veitast eins møguleikar til útbúgving, arbeiði, yrkisliga og mentanarliga menning.
    - bannar allan beinleiðis og óbeinleiðis mismun á fólki vegna kyn í sambandi við starvssetan, uppsøgn, starvsmeting, lønarflokking, starvsflyting, starvsframflutning, farloyvi, arbeiðsumstøður og framíhjárættindi.
    - áleggur eins løn og ágóða annars fyri sama arbeiði, eins yrkis- og menningarmøguleikar til t.d. útbúgving, eykaútbúgving, umskúling, at fara á skeið ella á ein og hvønn hátt at taka lut í virksemi, ið gevur løntakarum økt starvsføri.
    - ásetur rætt til fráveru í sambandi við viðgongu, barnsburð og eftir barnsburð uttan skerjingar í lønar- ella eftirlønaraldri.
    - áleggur frálærutilfar til undirvísing og uppaling barna at samsvara við javnstøðuhugsjónina, herundir at øll lestrar- og starvsfrálæra skal leggjast soleiðis til rættis, at bæði kynini hava eins góðan møguleika at velja millum tey tilboð, undirvísingarstovnurin veitir.
    - áleggur øllum almennum nevndum, ráðum, umboðum og líknandi, sum fyrisitingarvaldið útnevnir, at verða sett saman soleiðis, at umleið eins nógvir limir av báðum kynum eru umboðaðir. Sama er galdandi fyri tær nevndir, ráð, umboð og líknandi, sum løgtingið og bý- og bygdaráðini útnevna, tá ið tey, ið útnevnast skulu, ikki nýtast at vera løgtings- ella bý/bygdarráðslimir.
    - skipar javnstøðunevndina, sum skal:
        - hava eftirlit við, at henda lóg verður hildin.
        - vera ráðgevi hjá myndugleikum, stovnum, feløgum og einstaklingum í javnstøðuspurningum.
        - geva tilmæli í javnstøðumálum.
        - taka ímóti og viðgera kærur frá fólki, sum halda seg hava verið fyri mismuni vegna kyn.

2. Løgtingslóg nr. 48 frá 3. apríl 2001 um barsilsskipan
   - bannar arbeiðsgevarum at siga upp løntakara, tí viðkomandi hevur sett fram krav um at nýta rættin til barnsburðarfarloyvi, ella annars siga upp vegna viðgongu, barnsburð ella ættleiðing.
3. Løgtingslóg nr. 63 frá 26. mai 2011 um at banna mismuni á arbeiðsmarknaðinum orsakað av breki
   - bannar arbeiðsgevarum at gera mismun á starvsfólki ella umsøkjarum til størv vegna brek, veri tað játtandi ella noktandi mismunur, í sambandi við starvssetan, uppsøgn, starvsflyting, starvsframflutning ella viðvíkjandi lønar- og setanartreytum
   - bannar at sipa til brek sum fyrimun ella vansa, tá ið søkt verður eftir fólki til starv ella vinnuliga útbúgving.
4. Løgtingslóg nr. 132 frá 10. juni 1983 um fyrisitingarlóg
   - bannar, at upplýsingar verða latnar øðrum fyrisitingarmyndugleika um privat viðurskifti hjá einstaklingum, herundir upplýsingar um ættarslag, trúgv, húðarlit, um politisk, felagsskaparlig, kynslig og revsiverd viðurskifti.
5. Løgtingslóg nr. 80 frá 7. juni 2020 um vernd av persónsupplýsingum (Dátuverndarlógin)
   - bannar viðgerð av persónsupplýsingum um húðarlit, ættarslag ella etniskan uppruna, politiska, átrúnaðarliga ella heimspekiliga sannføring ella yrkisfelagsligt tilknýti eins og viðgerð av ílegudátum, lívmátingum við tí endamáli eintýtt at eyðmerkja ein persón, heilsuupplýsingum, upplýsingum um kynslig viðurskifti, revsiverd viðurskifti ella upplýsingum um munandi sosialar trupulleikar og onnur privat viðurskifti.
6. Leiðbeining nr. 8002 frá 10. juli 2023 um uppsøgn
   - bannar ósakligan mismun vegna kyn, tjóðfrøðiligan uppruna, aldur og annað.
7. Rundskriv nr. 9001 frá 26. november 2018 um lógarsmíð
   - áleggur kynsóheft orðalag, tá ið tað er gjørligt.
8. Evropiski mannarættindasáttmálin, sum í grein 14
   - bannar allan mismun vegna kyn, ættarslag, húðarlit, móðurmál, trúgv, politiska ella aðra sannføring, tjóðskaparligan ella sosialan uppruna, tilknýti til minnilutabólk, ogn ella aðra støðu.

9. Sáttmáli um rættindi teirra, ið bera brek, sum í grein 3 ásetur meginreglur um m.a.:
    - at banna allan mismun.
    - fulla og veruliga luttøku og felagsskap í samfelagnum.
    - javnbjóðis møguleikar.
    - javnstøðu millum menn og kvinnur.
10. Kvinnurættindasáttmálin hjá ST (CEDAW)
    - ST-sáttmálin frá 1978 hevur til endamáls at beina burtur allan mismun móti kvinnum, og at fremja javnstøðu millum kvinnur og menn á øllum samfelagsøkjum. Løgtingið samtykti 31. mars 1987 at seta sáttmálan í gildi fyri Føroyar.
11. Innanhýsis leiðreglur Fróðskaparseturs Føroya
    - Í leiðreglunum hjá Fróðskaparsetrinum um niðrandi atburð stendur, at Fróðskaparsetrið ikki góðtekur happing, mannamun, kynsligan ágang, ófólkaligan og ágangandi atburð, hóttanir og kropsligan ella sálarligan harðskap o.a. Leiðreglurnar fevna ikki bert um kyn, men eisini um niðrandi atburð í sambandi við aldur, húðarlit, tjóðskaparligan ella tjóðfrøðiligan (en. *ethnic*) uppruna, trúgv, skerdan yrkisførleika, kynsligan samleika og politiska sannføring.

Umframt nevndu lóggávu og regluverk hevur Føroya Landsstýri skipað

12. Demokratia, sum hevur umboð úr øllum flokkum á Løgtingi, eitt umboð fyri Kommunufelagið, eitt umboð fyri Kvinnufelagssamskipan Føroya og eitt umboð fyri Javnstøðunevndina.
    Uppgávurnar hjá Demokratia eru, at:
    - skipa fyri tvørpolitiskum tiltøkum fyri at fáa javnari kynsumboðan í politikki.
    - økja um leiklutin hjá kvinnum í politiskum avgerðum.
    - økja um talið á kvinnum á Løgtingi og í kommunustýrum, so at umboðanin samsvarar á leið við umboðanina í hinum Norðurlondum.
13. "Avtalu um virknan starvsfólkapolitikk", ið styrkir møguleikarnar hjá landsins stovnum viðvíkjandi starvsfólkapolitikki á hesum økjum:
    - førleikamenning
    - eldrapolitikkur
    - familjupolitikkur

- javnstøða

# 10 Orðalisti

Javnstøðuætlan, kynsjavnstøðuætlan, kynsjavnaðarætlan: Gender Equality Plan (GEP)